FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. desember 2023
J. nr.: 23/25208-2
Viðgjørt: TM

Svar til §52a fyrispurning nr. 52-058/2023 frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um frítøku fyri meirvirðisgjald av sjóvarhitaloysnum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Eru reglurnar um at fáa meirvirðisgjaldið endurgoldið, tá hitapumpur verða keyptar, eisini galdandi fyri sjóvarhita?
2. Um ikki, hvør er orsøkin til, at sjóvarhiti ikki verður javnsettur við hitapumpur og jarðhita í mvg-lógini?
3. Um munur er á meirvirðisgjaldinum fyri hesar hitaloysnirnar, er so ætlanin at fáa tann munin burtur?

Svar:

Til nr. 1
Fíggjarmálaráðið hevur fingið upplýst, at reglurnar um at fáa meirvirðisgjaldið endurgoldið, tá hitapumpur verða keyptar, eru eisini galdandi fyri sjóhitaskipanir. Víst verður til § 3 d, stk. 1-4, í galdandi løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald og til løgtingsmálini nr. 122/2016 og nr. 067/2020.

Til nr. 2 og nr. 3
Sí svarið til nr. 1.

Tinganes, 18. desember 2023

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum